# Sláið Ring til Íslands at dansa

**Stóra dansistevnan, Ísleikur, verður í Reykjavík í døgunum 9. til 16. juli, og frá 6. til 9. juli verður møguleiki fyri útferðum**

FØROYSKUR DANSUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í summar fer ein væntandi stórur dansihópur til Íslands at verða við á dansistevnuni Ísleikur.

Talan er um stevnur undir NORDLEK-avtaluni. Stóru NORDLEK stevnurnar verða hildnar triðja hvørt ár í teimum stóru Norðurlondunum. Ímillum hesar stevnurnar eru smærru stevnurnar Havleikur í Føroyum og Ísleikur í Íslandi.

Seinasta NORDLEK stevnan var í Lathis í Finnlandi í 2009, og næsta stóra stevnan verður í Steinkjær í Noregi í 2012.

Luttakararnir fáa møguleika at dansa og uppliva dans úr hinum Norðurlondunum, og har umframt eisini at uppliva stórslignu íslendsku náttúruna og íslendsku mentanina.

Undan sjálvari dansistevnuni verður møguleiki at gera langar útferðir. Serliga útferðin á Vestfirðir tykist spennandi og forkunnug, sigur Sláið Ring á heimasíðu sínu. Farið verður úr Reykjavík 6. juli og komið verður aftur 9. juli.

Sjálvar stevnudagarnar er møguleiki at gera stytri útferðir, millum annað útferð til Gullfoss, Geysir og Tingvallir, útferð út í Vestmannaoyggjar, jøklatúr á hundasletu ella túr í Bláa Lónið.

### Fundur í Kollafirði

Í sambandi við Íslandsferðina skipar Norðstreymoyar Dansifelag fyri almennum fundi í Bjargingarfelagshúsunum í Kollafirði. Har verður greitt frá ferðini og fólk kunnu tekna seg fyribils til.

Maria Samuelsen frá ND sigur, at tað hevur týdning, at fólk tekna seg til fyribils nú, hóast endaliga tilmeldingin ikki er fyrr enn 1. mai.

- Tað ræður um at bíleggja gistingarstøð í góðari tíð, vísir Maria Samuelsen á.

Norðstreymoyar Dansifelag virkar sum umboð fyri Sláið Ring til hesa ferðina, og hjá fólki, sum eitt nú ikki hava internet, ber til at tekna seg hjá Mariu Samuelsen á telefon 228624, ella Trúgva Samuelsen á telefon 281468.

Fundurin – sum altso er fyri øll, og ikki bert limir í Norðstreymoyar Dansifelag – verður í Bjargingarfelagshúsunum í Kollafirði mikukvøldið klokkan 19.



*Eitt væntandi stórt dansilag fer í summar til Íslands at taka lut í Ísleikur*



## P/F Fiskaaling søkir laborant

Søkt verður eftir laboranti til Fiskaaling at arbeiða í ymiskum verkætlanum innan aling. Granskingarvirksemi á Fiskaaling er í støðugari menning, og vit hava tørv á einum kønum laboranti til núverandi og komandi verkætlanir. Av tí at Fiskaaling ger gransking og menning innan nógv ymisk øki, krevur laborantstarvið at tú ert fleksibul og áhugað/ur í at arbeiða við ymiskum slag av laborant arbeiði.

**Førleikar**
- Útbúgvin laborantur
- Góð samstarvsevni
- Fleksibul
- Gott yvirblik
- Jaliga innstillað/ur at læra

Fiskaaling manglar í løtuni laborant til verkætlanir innan góðsku á alifiski, resistenskanning av laksalús og ílegugransking. Tað er ein fyrimunur um tú hevur kunnleika til eitt ella fleiri av hesum økjum og/ella aðrar viðkomandi starvsroyndir.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ásu Jacobsen á tlf. 214748 ella Ingolf Joensen á tlf. 214747.

Umsókn við avritum og møguligum ummælum, skal sendast til:

**P/F Fiskaaling**
Við Áir
FO-430 Hvalvík

ella

fiskaaling@fiskaaling.fo

Umsóknin skal vera komin fram í seinasta lagi 10. februar 2010. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Fiskaaling hevur virksemi við Áir, í Nesvík og í Skopun. Samlaða starvsfólkatalið er umleið 20, herav fleiri granskarar. Virksemi fevnir um at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni, herundir verkætlanir innan matvørugóðsku, aliumhvørvi, fóður, vatn, framleiðsluhættir, nýggj aliøkir, aling á harðbalnum økjum v.m. Meiri fæst at vita á www.fiskaaling.fo

P/F Fiskaaling | Við Áir | www.fiskaaling.fo

STARVSLÝSING



## Djóralæknar

Heilsufrøðiliga starvsstovan søkir eftir tveimum djóralæknum. Umsóknarfreistin er 5. mars 2010

Les nærri á www.hfs.fo

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Lesið Sosialin -so eru tit við!